SOSIALURIN HEVUR FINGIÐ NÝGGJ NUMMUR

tel 34 18 00

fax 34 18 01

teldupostur: post@sosialurin.fo • heimasíða: www.sosialurin.fo Sosialurin



# Fjølmiðlarnir skulu kunna um brek

**Ein yvirlýsing, sum hevur til endamáls at gera tey, ið bera brek, meiri sjónlig í evropeisku fjølmiðlunum, varð í summar samtykt á eini ráðstevnu í Athen**

ÁR TEIRRA BREKAÐU

*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Á ráðstevnuni um brek og fjølmiðlar, sum varð hildin í Athen í juni mánaða í ár, fingu fjølmiðlarnir skuldina fyri, at fólk í Evropu eru so óvitandi um tey, ið bera brek.

Ein kanning, gjørd millum íbúgvar í Evropu, vísir, at útvið 60% eru sera lítið kunnað um, hvussu ymisk brek kunnu vera.

Tí varð samtykt og ein yvirlýsing gjørd, sum sigur, at tey við breki skulu gerast meiri sjónlig í evropeisku fjølmiðlunum.

Á ráðstevnuni kom eisini fram, at summi lond eru raskari enn onnur at seta fólk við breki í starv á altjóða fjølmiðlum.

Umframt Ongland, varð Spania nevnt. Har hevur nevniliga ein blind kvinna høvuðsábyrgdina av dagligu tíðindasendingini hjá einari av landsins størstu sjónvarpsstøðum.

Ráðstevnan varð hildin í samband við, at Evroparáðið hevur lýst 2003 at vera ár teirra brekaðu.

Hvørt ár velur Evroparáðið eitt evni, ið serligt ljós skal varpast á, og í ár vórðu tað tey við breki, sum fingu henda framíhjárætt.



*Martin Johannessen er ein av mongu við rørslutarni. Hann er 20 ára gamal og gongur á HF í Klaksvík. Tað eru umstøðurnar hjá fólki við breki, sum Evroparáðið vil, at fjølmiðlarnir skulu gera meiri sjónlig*

# John vann eina X-Box

**Herfyri skipaði Javni saman við frítíðarklubbanum og M'as Blues Band fyri hugnatiltaki í gongugøtuni í Havn**

HUGNATILTAK

*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Í samband við "langan leygardag" í Havn, skipaði Javni fyri hugnatiltaki í gongugøtuni.

Tiltøkini hjá Javna eru altíð nakað fyri seg, og tey duga so sera væl at fáa fólk í góðum hýri.

Henda dagin var møguleiki at fylla eitt spurnarblað út, har tey, sum svaraðu rætt, kundu vera við í lutakasti um ein X-box.

Hepni vinnarin varð 18 ára gamli John Joensen úr Skúgvi. Hann býr í sambýlinum í Stoffalág. Hann



*Formaðurin í Javna handar John Joensen X-boxina, hann vann í eini spurnarkapping*

starvast í útibólkinum, sum eitt nú fríðkar um uttan fyri økini hjá ymisku stovnunum undir serforsorginI.

John er óførur arbeiðsmaður og hevur góðan arbeiðshug. Hann er heppin, tí hann hevur nakað at fara upp til hvønn morgun.

Men tíverri eru tað fleiri við menningartarni, sum ikki sleppa at gera samfelagsnyttu, rætt og slætt ti, at arbeiðsmarknaðurin ikki hevur sæð, hvussu ógvuliga stórt tilfeingi vit eiga, júst í hesum fólkum.